





# Pedagogur

Søkt verður eftir einum pedagogi at arbeiða 30 tímar um vikuna frá 1. september 2002.

Barnagarðurin er ein sjálvsognarstovnur normerað-ur til 30 børn, í aldrinum 3–7 ár, býtt sundur í 2 stovur.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagog-felag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið. Lønar-stig 9.

Meira fæst at vita við at ringja til okkum og tosa við leiðarin, tlf. 332948.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum við-mælum skal vera okkum í hendi seinast 15. juni 2002.

**Barnagarðurin »Sýslan«**
FO-380 Sørvágur

# Eiðis skúli

## Søkt verður eftir lærara til Eiðis skúla skúlaárið 2002/2003

- 1 starv uml. 18 tímar fyri lærara í farloyvi.

Starvið er tíðaravmarkað til skúlaárið 2002/2003 og verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærara-felag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokki 18.1 til 27.4.

Meira kann fáast at vita um starvið frá fyrstalærar-anum á tel. 42 35 79 ella 22 90 45.

Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum skulu vera Eiðis skúlanevnd í hendi í seinasta lagi týsdagin 28. mai 2002.

**Eiðis skúlanevnd**
/Annika Egholm
470 Eiði

Eiðis skúli hevur undirvísing 1.-7. árgangi. Komandi skúlaár verða 8 lærarar og 84 næmingar í Eiðis skúla.

## Handilslærlingur

**Hevur tú hug at royna teg?**

Vit søkja eftir fólki til handil okkara, arbeiðsuppgávurnar koma at umfata samskifti við viðskiftafólk, útkoyring, bílegging av vørum og egin ábyrgd av starvsøki, umframt aðrar uppgávur.

Væntað verður at tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt, ert fyrikomandi, við til uppsøkjandi uppgávur, nógva orku og áræði, ert opin og ikki bangin fyri avbjóðingum. Dentur verður lagdur á at tú hevur hug til at veita viðskiftafólki eina góða tænastu og ert ábyrgdarfullur.

Fyrimunur um tú hevur teldukunnleika og áhuga/kunnleika til motorar og maskinur - *ert kreativur.*

Skrivlig umsókn ynskist til 1. juni 2002

*Handilsfyritøkan Kaj Andreasen & Co. varð stovnað í Tórshavn í 1970. Fyritøkan útvegar maskinur og útgerð til byggivinnuna, og útgerð til fiski- alivinnuna, skip og bátar*

**Kaj Andreasen & Co**
Heilsøla · Smásøla · Umboð
Postboks 1200 · 110 Tórshavn

# Gistingarhús til sølu



Um hóskandi boð fæst, verður ferðamannaheimið »ÍBÚÐ«, Garðavegur 31 í Klaksvík hervið lýst til sølu.

Ferðamannaheimið »ÍBÚÐ« hevur verið rikið sum vallarheim í 26 ár, við 40 seingjaplássum í 12 køm-urum.

Húsið er í 2 hæddum, hvar tann niðara hæddin er góðkend sum vallaraheim, og tann ovara hæddin er góðkend sum gistingarhús.

**Ring telefon 265425**

# Handilshøli til leigu



har Heimavirkið heldur til

**tlf 31 78 95**

# Vestmanna skúli

Søkt verður eftir lærarum í tíðaravmarkað størv skúlaárið 2002/2003 fyri lærarar í farloyvi, lækkað tímatal, ráðgeving og skúlavegleiðing; fulltíðar-størv og parttíðarstarv.

Størvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til skúla-leiðaran, tlf. 424105 ella 424264, ella frá Jógvan í Dávastovu, formann í skúlastýrinum, tlf. 424566.

Umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í sein-asta lagi 29. mai 2002.

**Vestmanna Skúlastýri**
v/ Jógvan í Dávastovu
350 Vestmanna

# Lærarastørv við Tofta skúla

Vegna farloyvir, verður søkt eftir 3 lærarum til Tofta skúla. Størvini eru tíðaravmarkað til skúlaárið 2002/2003.

Størvini eru til fulla tímatalvu.

Størvini verða lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Umsóknirnar skulu verða skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 1. juni 2002.

Leggið við ljósrit av prógvi og møguligum viðmæl-um.

**Skúlastýrið fyri Tofta skúla**
v/ Jóhannus Danielsen
650 Toftir

Lesið Sosialurin -tað loysir seg



# Kvívíkar skúli

## søkir eftir lærara til skúlaárið 2002/2003

Vegna lærara í farloyvi, er eitt tíðaravmarkað starv við Kvívíkar skúla, skúlaárið 2002/2003.

**Førleikakrøv:**
Lærara, ið serliga kann undirvísa í tónleiki, svimjing/fimleik og annars øllum lærugreinum.

**Um skúlan:**
Kvívíkar skúli er ein fýraflokkaður skúli við næming-um frá 1. til 7. árgang. Næmingatalið komandi ár er 51. Fimm lærarar eru við skúlan og kemur tú at vera ein teirra. Skúlin er væl útgjørdur við fimleikarhøll, svimjihyli og telduhøli.

**Setanartrteytir:**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjar-málastýrið og Føroya Lærarafelag í lønarflokki 18.1 til 27.4.

Meir fæst at vita hjá skúlaleiðaranum, Bjarna Heine-sen, tlf. 421291 fartlf. 211504.

Umsóknir við prógvi og viðmælum skulu sendast til Kvívíkar Skúlastýrið í seinasta lagi 31. mai 2002 kl. 12.00.

**Skúlastýrið fyri Kvívíkar skúla**
Att: Jan Andreasen
340 Kvívík




# Til sølu

Ein Scania 112 við skiftilastskipan.
Ein Scania 86 við krana (bilurin hevur skaða).
Ein sandgrabbi.

**Tlf. 210292**

**FAROE LAW**

Bjóðar heimligar og altjóða loysnir

Tosið við Eyðfinn Jacobsen, advokat ella Kára á Røgvi, adv. fulltrúa um tygara tørv

Tinghúsvegur 14,4
P.O.Box 1218
FO-110 Tórshavn
tel 359900 · fax 359901
mob 219902
dania@post.olivant.fo
www.faroe-law.fo

**Trygdarútgerð til øll endamál!**

- Verndarhjálmar og húgvur
- Hoyrivernd v/FM radio
- Brillur
- Maskur
- Trygdarskógvar
- Fallsikringar
- Handskar
- Hondreins
- Vit útvega skiltir til øll endamál!

Vit taka okkum av øllum uppgávum innan arbeiðaravernd

**Kaj Andreasen & Co**
Heilsøla, smásøla og umboð - Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820

**Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð**

Nú eisini úr Føroyskum gróti

Skjót levering

Prísir við litmyndum ... kring ... útlandið



**Danstein**
www.danstein.fo
Tel. 447512
Tel. 217512
Tel. 318323
Fax 449961
RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN

Sosialurin - 311820



**Taljur**
**Stroppar**
**Trýst-slangur**
**Spuli-slangur**

**Tórshavnar Maskinhandil**
v/ Tummas Andreasen
Varðagøta 29 - 30
100 Tórshavn - Tlf. 313442

**TK Stovan**

## Kunningarfundur um einkarrætt

**Hvussu verjir tú eina vøru ella eitt hugskot við patent, vørumerki, brúksmodell, design (íroknað Software).**

**Mikud. 22. mai kl. 14.00-16.30 á Tekn. Skúla í Klaksvík**

**Hósd. 23. mai kl. 14.00-16.30 á Hotel Føroyum í Havn**

Patent- og Varemærkestyrelsen skipar saman við TK Stovuni fyri almennum kunningarfundi.

Endamálið við fundunum er at kunna virkjum og einstaklingum um møgu-leikarnar fyri at verja rættin til nýggjar framleiðslur (vørur og hugskot), t.d.:

- Hvat kanst tú fáa einkarætt til?
- Hvat hendir, frá tí, at ein umsókn er latin inn til Patent- og Varemærkstyrelsen?
- Hvør skrivar umsóknina fyri meg, ella kann eg gera hetta sjálvur?
- Hvussu slepst undan at misnýta rættin hjá øðrum til eina vøru ella hugskot?
- Hvar finni eg ókeypis hjálp á Internetinum um evnið einkarætt?
- Hvussu kann Patent- og Varemærkestyrelsen ella TK Stovan hjálpa tær?
- Um eg havi fingið rættin, hvussu verji eg rættin móti misnýtslu?
- Hvat kostar tað?

Fundurin er fyri vinnurekandi og einstaklingar, sum hava áhuga fyri evninum.
Ábyrgdarøkið hjá Patent og Varestyrelsen er Føroyar, Grønland og Danmark.
Henrik Hugger, kunningarstjóri hjá Patent og Varemærkestyrelsen, hevur fyrr verið í Føroyum í samband við kunningarfund um einkarrætt. Hann fer saman við TK Stovuni at greiða frá, hvussu farið verður fram, tá ein skal taka patent, og hvørja hjálp ein kann fáa í hesum sambandi.
Á fundinum viðgera vit ofta settar spurningar. Evnið er viðkomandi fyri bæði størri og smærri virkir og fyri einstaklingar, sum hava áhuga fyri evninum.
Hóast fólk ella virkir fáa eitt gott hugskot, merkir tað ikki altíð, at ein skal taka patent. Greitt verður frá ymiskum øðrum møguleikum. Somuleiðis verður nomið við evnið SW, og heimasíður.
Somuleiðis verður greitt frá, hvussu ein tryggjar sær rættin til eitt vørumerki, eitt brúksmodell og eitt design (klæðir, skinnvørur, SW, heimasíður v.m.). Hvat er munurin millum patent og brúksmodell, og nær er tað av týdningi at verja eitt design?

**Tilmelding:** TK Stovan, fax 31 93 63, tlf. 31 73 66 ella teldupost: tk@tk.fo
Tilmelding í seinasta lagi **týsdagin 21. mai 2002**
Tiltakið er ókeypis, men kaffisteðgurin ger, at neyðugt er at melda seg til frammanundan.

Virkisnavn: Tal av luttakarum:

Navn/nøvn:

Tel.: Fax:

**TK Stovan**
Niels Finsens gøta 37, FO-100 Tórshavn
**Tel** +298 317366, **Fax** +298 319363
tk@tk.fo
www.tk.fo

**VILJI VITAN VØKSTUR**

TK Stovan er ein liður í menningini av føroyska vinnilívinum og samstundis ein partur av tí umfevnandi danska TIC-kunningarsamstarvinum.

